Jákup sjúkur til Glasgow

Óli Johannesen er framvegis ikki á liðnum hjá AGF, sum sunnudagin misti oddasessin í superliguni

Í gjárkvøldið møttust Herfølge spælararnir at fyrireika seg til ferðina til Glasgow. Í dag flýgur Herfølge hópurin, sum í nátt hevur hildið til á einum gistingarhúsi, til Skotlands. Har skulu teir fyrireika seg til seinna Europa Cup dystin, sum verður á Hampden Park í Glasgow í annað kvøld. Fyri tveimum vikum síðani tapti Herfølge 3–0 á heimavølli, og fyritreytirnar eru ikki serliga góðar fyri einum betri úrsliti.

Leygardagin var Herfølge í Brøndby. Stórfelagið í vestara partinum av Keypmannahavn skal longu í kvøld royna seg í Europa Cup. Í Hamburg skulu teir stríðast fyri at taka 2–0 tapið á heimavøllinum innaftur. Leygardagin vunnu teir ikki minni enn 5–0 á Herfølge, og tí er tað ikki undarligt, um sjálvsálitið undan vitjanini í Hamburg hevur fingið eina lítla tonn rætta vegin.

Jákup Mikkelsen sat á beinkinum og sá liðfelagarnar tapa 5–0 í Brøndby. Og tað var einki stuttligt hjá eykamálverjanum, Claus Ødengaard, sum var ein av eykamálverjunum í Brøndby, áðrenn hann flutti til Herfølge.

Sambært donsku fjølmiðlunum var Herfølge málverjin ótryggur, og okkurt av bløðunum vil vera við, at málverjin kundi lastast tvey ella trý av málunum.

Jákup Mikkelsen hevur verið plágaður av bruna í hjáholunum ella bihulebetændelse, sum tað verður rópt á donskum. Hann kendi seg ikki heilt raskan leygardagin, men hann var við á Brøndby stadion. John Faxe Jensen avgjørdi kortini, at eykamálverjin skuldi fáa møguleikan, og hjá honum var tað einki serliga stuttligt.

Jákup fekk í vikuskiftinum heilivág at taka, og í Herfølge vónaðu teir í gjár, at hann verður tøkur, tá teir í annaðkvøld í Glasgow skulu spæla ímóti Rangers. Eingin ivi er um samlaða úrslitið, men tað hevur stóran týdning fyri Herfølge at fáa eitt hampuliga gott úrslit.

AGF tapti

Óli Johannesen var mikukvøldið í miðverjuni á landsliðnum móti danska landsliðnum. Men AGF venjarin, Ove Christiansen, heldur seg framvegis ikki hava brúk fyri føroyska veteraninum, sum hevur spælt 45 landsdystir.

Sunnudagin hevði AGF vitjan av AB, sum hóskvøldið skal spæla á Tórsvølli móti B36. AB staðfesti Árhus, at teir hava eitt av liðunum, sum er best fyri í superliguni. Eftir at tað hevði verið málleyst í stoðginum, spílaði AB seg út og vann 3–1. Harvið varð AGF tríst av ovasta og aftur á fjórða pláss í superliguni. Saman við AB, sum hevur betri málmun, hevur AGF 9 stig.

Silkeborg vann 2–1 á heimavølli móti OB. Silkeborg er næstfremst við 10 stigum.

Viborg vann 2–1 á heimavølli móti Harderslev. Viborg er nýtt oddalið við 11 stigum. Hádersley er einasta liðið, sum einki stig hevur fingið. Teir eru aftast. Herfølge er næstaftast við trimum stigum.

Lyngby vann 2–1 á heimavølli móti AaB.

Í gjárkvøldið skuldu FC Midtjylland og FCK spæla.

Komandi vikuskifti skal Herfølge spæla á heimavølli móti AGF. Tað verður sunnudagin. Sama dag fær FCK vitjan í Parkini. Gestirnir verða Brøndby. Tað vil við øðrum orðum siga, at talan verður um tað, sum teir tey seinnu árini hava kallað uppgerðina um Keypmannahavn.

JH

Úrslit, danska superligan

Lyngby-Aab	2-1
Viborg-Haderslev	2-1
Silkeborg-OB	2-1
AGF-AB	1-3
Brøndby-Herfølge	5-0
FC Midtjylland-FCK	
(leiktur eftir evstamark mánadagin)	

Komandi dystir, 6 umfar

AaB-Viborg
Haderslev-Silkeborg
Herfølge-AGF
OB-FC Midtjylland
FCK-Brøndby
AB-Lyngby

Støðan, danska superligan

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Viborg	5	3	-	2	-	0	9	3	6	11
2	Silkeborg	5	3	-	1	-	1	8	11	-3	10
3	AB	5	2	-	3	-	0	11	5	6	9
4	AGF	5	3	-	0	-	2	7	8	-1	9
5	Lyngby	5	3	-	0	-	2	7	9	-2	9
6	Brøndby	5	2	-	2	-	1	15	5	10	8
7	OB	5	2	-	1	-	2	7	3	4	7
8	AaB	5	2	-	1	-	2	9	9	0	7
9	FCK	4	1	-	1	-	2	6	4	2	4
10	FC Midtjylland	4	1	-	1	-	2	7	7	0	4
11	Herfølge	5	1	-	0	-	4	6	17	-11	3
12	Haderslev	5	0	-	0	-	5	4	15	-11	0

Sámal og John leikbannaðir í botnstríðnum

Leiftur hongur í kløgnum tráði, meðan Pól Tnhorsteinsson og Valur stevna beint móti bestu deildini

Tað gongur framvegis at skriðuni hjá føroyska felagnum á Ólafsfirði. Í vikuni, sum fór, kom enn ein føroyskur kenningur til Ólafsfirðar í fótbóltsøríndum. Páll Guðlaugsson er nú hjálparvenjari hjá Jens Martini Knudsen.

Páll Guðlaugsson hevur góð minni av Ólafsfirði. Undir hansara leiðslu í tvey ár vann felagið sær betri endastøður, enn teir nakrantíð høvdu gjørt áður.

Venjarasáttmálin hjá Pálli Guðlaugsson í Keflavík varð fyri einari góðari viku síðani strikaður. Men Páll gekk ikki leingi arbeiðsleysur. Mitt í síðstu viku kom hann norður á Ólafsfjørðin, har hann er farin til verka við tí eldhuganum, sum altíð hevur eyðkent venjaraarbeiðið hjá honum.

Sunnudagin var ÍBV á Ólafsfirði, og tað eydnaðist vestmannaoyingum at fara til hús aftur við øllum trimum stigunum. Teir vunnu 1–0. Málið fingu teir í 1. hálvleiki.

– Vit eru sera harmir yvir tapið. Aftur hesa ferð vóru vit omaná, tá tað snýr seg um spælbýti, og vit høvdu einar fimm stórar møguleikar at fáa mál. Men tað nyttar einki, tá tað bara eru hinir, sum megna at fáa mál. Tá teir høvdu skorað var gamaní hjá teimum at vera.

Hetta sigur Sámal Joensen av Ólafsfirði. Hann og Sámal Joensen frá.

Pól á veg upp

Uni Arge og hinir á Akranesi høvdu sunnukvøldið vitjan av botnliðnum Stjarnuni. Uni Arge var í álopinum hjá ÍA, men tað eydnaðist hvørki honum ella nøkrum øðrum at fáa mál. Dysturin endaði málleysur, og tað var einki serligt úrslit hjá ÍA, sum droymir um meistaraskap og Europa Cup.

Hjá Pól Thorsteinsson og Vali gongst sum eftir ánni í næstbestu deildini. Fríggjakvøldið høvdu teir vitjan av IR, sum teir sendu til hús aftur við 3–2 tapi. Tvey lið flyta beinleiðis upp í bestu deildina. FH av Hafnafjørðinum er á odda við 31 stigum, og Valur hevur 30 stig. Teir hava onga kapping um næstfremsta plássið.

JH

Úrslit, Íslendska landssímadeildin

Leiftur-IBV	0-1
ÍA-Stjarnan	0-0
KR-Fylkir	2-1
Keflavík-Fram	3-3
Breiðablik-Grindavík	
(leiktur eftir evstamark mánadagin)	

Komandi dystir, 16. umfar

Grindavík-KR
Fylkir-Keflavík
Stjarnan-Leiftur
ÍBV-Breiðablik
Fram-ÍA

Støðan, íslendska landssímadeildin

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Fylkir	14	8	-	5	-	1	31	11	20	29
2	KR	13	7	-	3	-	3	19	12	7	24
3	ÍBV	14	6	-	5	-	3	23	13	10	23
4	Grindavík	14	5	-	6	-	3	17	12	5	21
5	ÍA	14	6	-	3	-	5	14	12	2	21
6	Keflavík	14	4	-	5	-	5	14	21	-7	17
7	Breiðablik	14	5	-	1	-	8	21	23	-2	16
8	Fram	14	4	-	3	-	7	16	23	-7	15
9	Stjarnan	14	3	-	3	-	8	12	23	-11	12
10	Leiftur	13	1	-	6	-	6	16	33	-17	9

Julian sá reytt móti Kongsvinger

Kurt Mørkøre var seymaður við fýra stingum, og so skoraði hann tvær ferðir og varð kosin dagsins maður í Sogndal

Tað var dramatikkur í luftini, tá gamla felagið hjá Juliani Johnsson, Kongsvinger, sunnudagin var í Sogndal. Heimaliðið vann 5–4, men áðrenn teir høvdu togað øll stigini innanborða høvdu teir verið í sera tungum sjógvi.

– Tað tóktist sum um vit ikki vóru vaknaðir, tá teir vóru komnir framum 2–0. Hesa løtuna sá tað dapurt út hjá okkum. Vit vóru aftanfyri við tveimum málum, og tað gjørdist ikki betri av, at Kurt Mørkøre tíðliga í dystinum lá uttanfyri eina løtu. Hvussu long løtan var, veit eg ikki, men hon kendist ógvuliga long, sigur Julian Johnsson úr Sogndal. Hann er sera væl nøgdur við, at tað eydnaðist at vinna øll stigini.

– Tað eri eg ikki minst tí, at eg setti liðfelagarnar í eina keðiliga støðu, tá vit í 2. hálvleiki vóru aftanfyri 4–3. Longu í 1. hálvleiki fekk eg eitt gult kort, tí dómarin helt seg hava boyrt meg siga okkurt, sum honum ikki dámdi. Í 2. hálvleiki fekk eg eitt gult kort afturat fyri eina takling, sum dómarin metti var til gult kort. Sjálvt um liðfelagarnir vóru undirmannaðir, so eydnaðist teimum at skora tvær ferðir, og harvið vunnu vit týdningarmesta sigurin á árinum, heldur Julian Johnsson.

Enn eina ferð vísir Julian Johnsson á, at Kurt Mørkøre er so sera týdningarmikil fyri Sogndal:

– Hann minkaði um munin til 1–2, og hann minkaði um munin til 2–3. Báðu ferðirnar var tað eftir støður í brotsteiginum. Kurt spældi við innbundnum høvdi mest sum alla tíðina. Hann varð seymaður í pannuna við fýra pentum, eftir at hann var brostin saman við ein av mótstøðumonnunum. Aftaná varð Kurt kosin at vera dagsins maður í Sogndal, og tað haldi eg, at hann hevði uppiborið.

Julian Johnsson sá reytt móti fyrrverandi liðfeløgunum, men tað eydnaðist tó Sogndal at venda dystinum

Mørkøre vóru við alla tíðina í 5–4 sigrinum. Sigurin hevði við sær, at Sogndal styrkti um sína støðu á triðja plássinum. Lyn hevur 50 stig, Strømsgodset hevur 40 stig, og Sogndal hevur 35 stig. Kongsvinger er á fjórða plássinum. Teir hava 30 stig.

Tá føroysku landsliðsmenninir eftir landsdystin móti Danmark vóru á veg aftur til Noregs, fingu teir at vita, at felagið hjá teimum hevði mist trý stig á skrivaraborðinum, sum teir frammanundan høvdu vunnið á vøllinum. Talan var um 5–1 útisigurin á Byåsen.

– Vit sótu í flúgaranum á veg úr Keypmannahavn og til Oslo, tá Kurt vísti mær ein lítlan notits í norska blaðnum VG. Har stóð, at dómsnevndin hevði gjørt av, at vit skuldu tapa dystin ímóti Byåsen, tí vit høvdu brúkt ein bannaðan spælara. Vit vóru allir vónbrotnir, og tí var tað sera kærkomið, at vit vunnu lykladystin um triðja plássið.

Hvussu bar tað til, at tit brúktu ein leikbannaðan spælara?

– Tað eigur ikki at koma fyri. Hann hevði fingið trý gul kort, og tí var hann sjálvsagt leikbannaður. Í eftirlagnum høvdu teir lisið gamlar ásetingar, men teir áttu sjálvsagt at vitað, hvussu reglarnir vóru. Tað var ov vánaligt av teimum.

Tey bæði gulu kortini, sum Julian fekk sunnudagin, gera, at hann verður leikbannaður komandi vikuskifti, tá Sogndal skal spæla á útivølli júst ímóti Byåsen. Hesa ferð fara teir í Sogndal ivaleyst at vera meiri varnir, og tað skal neyvan brúkast nøgv krút uppá at seta teir upp.

Julian letur einki at dómaranum, sum sunnudagin ansaði floytuni:

– Har vóru nógvir langir bóltar og nógvir nærdystir. Dómarin gjørdi nógv mistøk báðar vegir. Vit hildu, at hann gav okkum eitt brotsspark – Tommy Øren skoraði – sum ikki var brotsspark, og vit hildu eisini, at hanngóðkendi eitt mál hjá Kongsvinger, sum hann ikki átti at havt góðkent, tí teir gjørdu fríspark ímóti málverjanum hjá okkum.

jh

Úrslit Norska 1. deild

Ham-Kam-Eik-Tønsberg	4-2
Kjelsås-Lyn	2-2
Raufoss-Skeid	2-4
Sandefjord-Byåsen	5-3
Sogndal-Kongsvinger	5-4
Strindheim-L/F Hønefoss	4-1
Strømsgodset-Tromsdalen	4-2

Komandi dystir, 20. umfar

Byåsen-Sogndal
Eik-Tønsberg-Raufoss
Kongsvinger-Strømsgodset
Lyn-L/F Hønefoss
Sandefjord-Strindheim
Skeid-Kjelsås
Tromsdalen-Ham-Kam

Støðan, norska 1. deild

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Lyn	19	16	-	2	-	1	42	11	31	50
2	Strømsgodset	19	12	-	4	-	3	43	20	23	40
3	Sogndal	19	11	-	5	-	3	59	30	29	38
4	Kongsvinger	19	8	-	6	-	5	31	26	5	30
5	Raufoss	19	7	-	6	-	6	33	29	4	27
6	Tromsdalen	19	8	-	1	-	10	29	44	-15	25
7	Ham-Kam	19	7	-	3	-	9	31	34	-3	24
8	L/F Hønefoss	19	6	-	4	-	9	28	31	-3	22
9	Kjelsås	19	6	-	4	-	9	23	32	-9	22
10	Sandefjord	19	6	-	3	-	10	26	32	-6	21
11	Skeid	19	5	-	5	-	9	21	33	-12	20
12	Strindheim	19	5	-	4	-	10	25	36	-11	19
13	Eik-Tønsberg	19	5	-	3	-	11	22	34	-12	18
14	Byåsen	19	6	-	0	-	13	22	43	-21	18

TB leikararnir høvdu nógv mál at fegnast um, tá B36 var á vitjan

TB fylgir við

2. deild: Tvørámenn tóku leygardagin ímóti B36, og tað endaði við 6-1 stórsigri til heimaliðið, sum enn er við í stríðnum um at flyta beinleiðis upp í 1. deild

JÁKUP MØRK

TB kundi ikki fingið eina betri byrjan uppá dystin á Sevmýru. Eitt fríspark varð sent innfyri úr høgru síðu, har aftasti maður hjá B36 snittaði bóltin framvið málverjanum í egið mál, og so var TB frammanfyri. Harvið varð slóðað fyri einum týdningarmiklum sigri. B36 hevur bara vunnið einaferð á útivølli, og avrikið hesuferð var ikki øðrvísi, enn tað plagar at vera á útivølli.

TB var als ikki sannførandi í fyrra hálvleiki, og B36 hevði møguleikan at javna, men einki bar til hjá havnarmonnum henda dagin. Ístaðin økti TB um leiðsluna, tá ið tann garvaði Eyðun Gullok Svalbard fekk fatur á einum innleggi úr høgru og langaði hann í kassan.

Í seinna hálvleiki kom B36 við aftur í dystin eina løtu, tá ið Brynleif Hansen minkaði um munin til 2-1. Ein bóltur kom inn í brotsteigin úr høgru síðu, og málverjin megnaði ikki at steðga skotinum frá Brynleifi. Nú var aftur spenningur í dystinum eina løtu, men TB økti aftur til 3-1, og so var dysturin í veruleikanum avgjørdur. B36 megnaði als ikki at reisa seg aftur og hótti ongantíð málið hjá TB málverjanum, sum fyri tað mesta var áskoðari eftir triðja málið hjá TB.

Nýggi leikarin hjá TB, Mihai Matai, skoraði til 3-1, hóast málverjin fekk hondina á bóltin, tá ið hann var hægstur eftir eitt hornaspark. Eftir hetta fall B36 heilt í fátt, og tvørámenn kundu taka sær av løttum.

Í fyrra dystinum millum hesi bæði liðini vann B36 heili 5-1, men hesuferð var vent í holuni. Seinastu tríggjar minuttirnar var B36 verjan púra opin, og TB fekk trý mál hesa løtuna. Eyðun Svalbard skeyt tvey av hesum málunum, annað var eitt sera flott langskot. Hinum málinum stóð Mihai Matai fyri.

TB er nú farið framum ÍF uppá annað pláss, og teir eru enn í hølunum á EB/Streymi, sum er trý stig frammanfyri. Enn eru tvørámenn við í dystinum um beinleiðis uppflyting, men EB/Streymur verður torført at koppa av ovastu rók. Nú eru bara seks dystir eftir, og næstu ferð skal TB spæla ímóti HB í Havn. Trý stig eru neyðug í øllum dystunum, um tað skal eydnast aldursforsetanum í føroyskum fótbólti at vinna sær sæti í bestu deildini aftur.

TB-B36 6-1 (2-0)

1-0: Sjálvmál
2-0: Eyðun Gullok Svalbard
2-1: Brynleif Hansen
3-1: Mihai Matei
4-1: Eyðun Gullok Svalbard
5-1: Mihai Matei
6-1: Eyðun Gullok Svalbard